# Tjaldur tók av

**HONDBÓLTUR** Spælararnir og venjararnir hjá Tjaldur vistu undan dystinum, at annað hvørt Stjørnan ella Neistin mistu stig í gjár. Tí ráddi um hjá teimum at fáa fult í Vestmanna. Tað eydnaðist

Uni Holm Johannesen

Tjaldur vann uttan stórvegis hóvasták í Vestmanna í gjár. Hóast kvinnurnar úr Runavík, sum vunnu steypakappingina síðsta vikuskiftið, ikki spældu við fullari megi, so kláraði VÍF ongantíð at hótta leiðsluna hjá gestunum. Verandi steypavinnararnir vunnu sær eina greiðslu leiðsluna beinanvegin, og heimaliðið hevði einki at svara aftur við. Tjaldur noyddist ongantíð at kíta seg. Hóast kvinnurnar úr Runavík framdu fleiri óneyðug mistøk og misnýttu fleiri upplagdar málmøguleikar, var sigurin ongantíð vanda.

Eins og í steypafinaluni síðsta vikuskiftið, gingu Adina Petrea og Simona Petersen undan hjá Tjaldri. Tær skutu eisini flest mál fyri Tjaldur.

### Liljan var uttanfyri

Liljan Djurhuus er eitt av stjørnuskotunum í føroyskum kvinnuhondbólti. Hon fekk sítt gjøgnumbrot í fjør, tá hon átti virknan leiklut í álopsspælinum og verjuspælinum hjá VÍF. Hon hevur somuleiðis staðið seg væl í hesum kappingarárinum. Tað merkist eisini væl, at hon mangladi í álopsspælinum í gjár. Tað var saknur í hennara ágrýtni, hugflogi og skotstyrki. Hon er komin illa til skaða í hondini og spælir væntandi ikki næstu tvær vikurnar.



*Tað var uttan stórvegis hóvasták, at Tjaldur vann í Vestmanna í gjár. Steypavinnararnir øktu sostatt um munin niður til Neistan, sum er nummar trý*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Tóku av

Oddabrak var í Klaksvík í gjár. Tað var tískil frammanundan greitt, at anna av liðunum, sum kappast um at sleppa í finalurnar um føroyameistaraheitið, snávaði í gjár. Neistin tapti fyri Stjørnuni. Tjaldur tók av møguleikanum og øktu um munin niður til blálittu havnarkvinnurnar. Fýra stig skilja liðini í løtuni, men Tjaldur hevur spælt ein dyst meira.

# 9 stig av 10 møguligum

**HONDBÓLTUR** VB hevur fingið luft undir veingirnar. Vágskvinnur hava ikki tapt seinastu fimm landskappingardystirnar

Uni Holm Johannesen

Egil Steintórson var harmur, tá Sosialurin tosaði við hann eftir javnleikin móti Tjaldur í Runavík tann 7. februar. Hann noyddist at staðfesta, at leikarahópurin hevur verið illa darvaður av skaðum, og tað hevur havt við sær, at VB eigur ongan virknan leiklut í oddastríðnum.

– Eg veit ikki, um tað er ein fyrimunur, at vit hava lítið at spæla fyri. Vit vilja sjálvandi vera við í oddastríðnum, men mugu bara ásanna, at tað er ov seint, segði hann tá.

VB dragnaði tíðliga í stríðnum um at vinna seg í finalurnar um føroyameistaraheitið. Kvinnurnar í Vági hava tískil bara roynt seg í leiklutinum at arga ovastu liðini. Tað hevur eydnast serliga væl seinastu vikurnar. Vágskvinnur hava ikki tapt seinastu fimm landskappingardystirnar, og tað hava millum annað vunnið á Stjørnuni og spælt javnt móti Tjaldri. Í gjár vann VB á botnproppinum StÍF, sum vitjaði í høllini í Vági. Úrslitið var 31-23.

### Málverjin fekk reytt kort

Tað fekk ikki stórvegis ávirkan, at málverjin hjá VB fekk reytt kort í fyrra hálvleiki. Hon brúkti neyðbremsuna og steðgaði einum mótstøðuleikara. Dómararnir sóu ikki annan møguleika enn at vísa henni av vøllinum. Eykamálverjin stóð seg væl. VB var á odda allatíð, og StÍF rann mest sum bara aftaná.

VB hevur skavað nígggju stig av 10 møguligum inn undir seg seinastu fimm landskappingardystirnar. Vágskvinnur hava seinastu vikurnar vunnið á Stjørnuni, Kyndli, VÍF og StÍF, og spælt javnt móti Tjaldri.

# Ongar undanførslur

**HONDBÓLTUR** Venjarin hjá Neistanum vil ikki hoyra talan um, at hansara spælarar mangla royndir. Neistakvinnurnar kunnu bara takka sær sjálvum fyri, at liðið er dragnað í stríðnum um FM-heitið, heldur hann

Uni Holm Johannesen

Sama søgan. Neistin stevndi móti sigrinum, men misti bæði stigini til kappingarneytarnar seinastu løtuna. Tað kom fyri, tá Neistin vitjaði Tjaldur fyri trimum vikum síðan. Tað hendi aftur í gjár, tá Neistin vitjaði Stjørnuna. Birgir Hansen, venjari hjá Neistanum, sigur við Kringvarpið, at vantandi roynir í avgerandi dystum er eingin undanførsla.

– Vit hava spælt fleiri slíkar dystir í hesum kappingarárinum. Vit hava spælt fleiri oddadystir og tvær hálvfinalur í steypakappingini. Vit vita, hvat krevst fyri at vinna hesar avgerandi dystirnar. Vantandi royndir er eingin undanførsla, sigur Birgir Hansen, og leggur afturat, at Neistin hevur ikki veittrað farvæl til møguleikan at sleppa í finalurnar um føroyameistaraheitið.

Neistin var á odda við trimum málum, tá 10 minuttir restaðu í. So gekk galið. Fjáltur kom á. Stjørnan, sum hevði verið lítið sannførandi, fór upp í ferð og fekk leiðsluna. Bára Skaale Klakstein, Stjørnan, varð útvíst í tveir minuttir, tá fýra minuttir restaðu í. Tað gjørdi ikki petti. Neistin gagnnýtti ikki meiriluta-støðuna. Einki dirvi at svara aftur. So fór Stjørnan avstað við báðum stigunum.

### Lítið hugflog

Barbara Brauer hevur verið stóra stjørnan hjá Neistanum í hesum kappingarárinum. Kanska tann størsta stjørnan í føroysku landskappingini. Serbiski stórskjúttin eigur ein virknan leiklut í, at Neistin er við í stríðnum um finaluplássini. Hennara royndir sum yrkisleikari í Jugoslavia, Portugal, Spania og Týsklandi, umfram 11 landsdystir fyri Jugoslavia, koma sanniliga yngru spælarunum til góðar. Hinvegin hevur verið funnist at, at hon spælir ein ov stóran leiklut í álopsspælinum. Mest sum einastu hótt-anirnar hjá Neistanum vóru skjótálop og Barbara Brauer í gjár. Ikki tí, tað eydnaðist væl. Trupulleikin var, at øll væntaðu, at hon skuldi taka ábyrgd, tá Stjørnan brádliga hótti leiðsluna seinastu minuttirnar. Eingin av hinum, uttan Jacklin Durhuus, høvdu áræðið at taka ábyrgd, meðan mest stóð á.

Spælið var undirhaldskent í gjár, men sannførandi var tað als ikki. Bæði liðini framdu óneyðuga nógv mistøk, og serliga vóru kvinnurnar úr Klaksvík lítið avgjørdar í løtum. Sum heild gekk illa at fáa ferð á spælið. Tað er ikki til at siga, hvør hevði uppiborið sigurin. At Stjørnan hevur fleiri royndir frá slíkum dystum, og dugir at handfara avgerandi støður, var sjónligt.

### Fótin frammanfyri

Stjørnan leggur lítið í, hvussu sigurin kom til høldar í gjár. Bara stigini komu í skjáttuna. Fýra stig skilja nummar eitt og nummar trý. Stjørnan hevur fótin framman fyri í stríðnum at røkka finalunum og tískil ein lítlan fyrimun, nú seinastu seks landskappingardystirnir skulu avgreiðast.

# Stjørnan staðið seg best

Oddaliðið Stjørnan hevur fingið flest stig burtur úr innanhýsis dystunum millum liðini, sum stríðast um at røkka finalunum um føroyameistaraheitið. Kvinnurnar úr Klaksvík hava fingið átta stig í alt móti Tjaldri og Neistanum í hesum kappingarárinum. Ein orsøk til, at Neistin er dragnaður í finalustríðnum, er, at liðið hevur bara fingið fýra stig burtur úr oddadystunum.

*uni@sosialurin.fo*

### Oddadystirnir í hesum kappingarárinum:

26.09.2010: Stjørnan – Neistin 28-22
19.10.2010: Neistin – Tjaldur 30-24
31.10.2010: Stjørnan – Tjaldur 27-23
16.11.2010: Neistin – Stjørnan 30-28
21.11.2010: Tjaldur – Neistin 32-25
18.12.2010: Tjaldur – Stjørnan 28-24
23.01.2011: Tjaldur – Neistin 29-28
30.01.2011: Stjørnan – Tjaldur 30-23
20.02.2011: Stjørnan – Neistin 27-24
20.03.2011: Neistin – Tjaldur
27.03.2011: Tjaldur – Stjørnan
10.04.2011: Neistin – Stjørnan

1. Stjørnan .................8 stig
2. Tjaldur....................6 stig
3. Neistin....................4 stig

## Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 18 | 514 | 421 | 93 | 30 |
| 2 | Tjaldur | 18 | 513 | 426 | 87 | 28 |
| 3 | Neistin | 17 | 461 | 394 | 67 | 24 |
| 4 | VB | 18 | 455 | 441 | 14 | 20 |
| 5 | Kyndil | 18 | 417 | 434 | -17 | 14 |
| 6 | VÍF | 18 | 406 | 497 | -91 | 7 |
| 7 | StÍF | 17 | 329 | 482 | -153 | 1 |